## Heilsa og sjúka

Í annaðkvøld, týskvøldið, hava føroyingar í Danmark høvi at hoyra serlæknan Boga Davidsen hugleiða um heilsu og sjúku. Tiltakið verður í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Bogi Davidsen, ið hevur virkað sum lækni í ein mansaldur, er kendur innan orðaskiftið um samkynd, og hann er eisini kendur sum góður frásøgumaður. Evnið til hugleiðingarnar hevur hann sjálvur valt, og hann fer at siga sína hugsan um heilsu og sjúku.

## Postboð siga upp

Tað er eftir øllum at døma ikki serliga hugaligt at vera postboð í Danmark. Í hvussu er søgdu næstan 7.000 postboð upp í fjør, og tað svarar næstan til ein triðing av øllum postboðunum í landinum. Aðalstjórin, Helge Israelsen, sigur við Jyllandspostin, at tað er ikki bara postverkið, sum skiftir fólk ofta, men hann ásannar tó, at alt er kanska ikki, sum tað eigur at vera. Fakfelagið sigur, at postverkið krevur alt ov nógv av postboðunum.

Formaður Sambandsfloksins:

# Vit standa við orðini um Kyoto

**– Eg ivist onga løtu í, at Føroyar í seinasta lagi um eitt ella tvey ár hava staðfest Kyoto-sáttmálan at galda fyri Føroyar. Uppskotiðhjá Tjóðveldisflokkinum tykist seriøst og positivt, og eg haldi, at samgongan eigur at taka hetta í størsta álvara, sigur formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Líkt er ikki til, at Sambandsflokkurin er hálsaður um í spurninginum um at seta í gildi Kyoto-sáttmálan at galda fyri Føroyar. Hetta merkir, at tað, sum flokkurin mælti til í tíðindaskrivi seinasta dag í oktober í fjør (sí greinina til høgru), heldur flokkurin framvegis vera hitt rætta.

Í tilmælinum hjá flokkinum í oktober var eingin slingur í valsinum: “Sambandsflokkurin mælir til, at Føroyar gerast partur av Kyoto-avtaluni um at minka um útlátiðav vakstrarhúsgassum...”

### Somu støðu

– Vit í Sambandsflokkinum hava ikki broytt støðu um Kyoto-málið. Uppskotiðhjá Tjóðveldisflokkinum er seriøst og positivt, og eg haldi eisini, at samgongan avgjørt eigur at taka hetta í álvara. Taðvar ikki annaðenn væntandi, at andstøðan fór at koma viðeinum slíkum uppskoti, nú hetta máliðtreingir á.

Kaj Leo heldur einki forgjørt vera í, at samgongan tekur undir viðuppskoti Tjóðveldisfloksins, sjálvt um taðkemur frá einum andstøðuflokki.

– Eg haldi heldur ikki, at tey úttalilsi, vit hava sæðog hoyrt, hava verið negativ. Spurningurin er, um samgongan samtykkir hetta uppskotiðsaman viðandstøðuni – ella, um samgongan ger sítt egna uppskot. Hetta er eitt álvarsmál, og eg ivist onga løtu í, at Føroyar hava staðfest Kyoto-sáttmálan innan eitt ella tvey ár.

Formaður Sambandsfloksins heldur ikki, at samgongan bara kann siga nei til eitt uppskot sum hetta.

– Vit hava eina ábyrgd, og vit mugu vísa hesa ábyrgd í verki. Eg havi lisið uppskotiðígjøgnum og haldi, at Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt eitt gott arbeiði. Tað er tí ikki óhugsandi, at samgongan kann taka undir viðuppskotinum, sigur hann.



*– Vit hava eina ábyrgd, og vit mugu vísa hesa ábyrgd í verki. Eg havi lisið uppskotið ígjøgnum og haldi, at Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt eitt gott arbeiði. Eg haldi taðtískil ikki vera óhugsandi, at samgongan kann taka undir við uppskotinum, sigur Kaj Leo Johannesen*

### Partur av Evropa

Kaj Leo Johannesen ásannar, at sum partur av Evropa og umheiminum annars noyðast Føroyar at vísa, at vit meina tað, vit siga, og tá iðrædur um umhvørvisvernd hava vit í longdini ikki ráðat vera eftirbátur.

– Eg haldi, at landsstýrismaðurin, sum situr viðorku- og umhvørvismálum eigur at fáa heimild til at taka upp samráðingar viðdanir um, hvussu Føroyar kunnu gerast partur av Kyoto-sáttmálanum um vernd av umhvørvinum. Eg havi skilt landsstýrismenninar hjá Fólkaflokkinum soleiðis, at teir ikki eru avvísandi í hesum máli, og eg veit, at Jacob Vestergaard hevur savnaðymisk hagtøl í hesum sambandi, sigur formaður Sambandsfloksins.

## Tað segði Sambandsflokkurin...

**Í fjør heyst sendi Sambandsflokkurin út eitt tíðindabræv, har mælt verður til at seta í gildi Kyoto-sáttmálan at galda fyri Føroyar**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var tann 31. oktober í 2006 – ella í fjør heyst – at Sambandsflokkurin í tíðindaskrivi boðaði frá, at “føroyskir myndugleikar eiga at taka undir við, at Føroyar gerast partur av Kyoto-avtaluni”.

Og lagt verður aftrat:

“Sambandsflokkurin mælir til, at Føroyar gerast partur av Kyoto-avtaluni um at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum...”

Í tíðindaskrivinum verður víst a ta sannroynd, at føroyingar á umhvørvisøkinum hava sera vánalig hagtøl at vísa á, og at vit teljast millum tey lond í heiminum, sum “útleiða mest av koldioxidi í mun til fólkatalið.

– Hetta er sera álvarsamt, staðfestir Sambandsflokkurin.

Lagt verður aftrat, at ein orsøk til hesa støðu okkara er, at vit eru ein fiskivinnutjóð, og harvið noyðast vit at brúka nógva olju fyri at fáa fatur á okkara náttúrurikidømi.

– Hetta hevur eisini verið brúkt sum ein undanførsla fyri ikki at taka undir við Kyoto-avtaluni. Men samstundis eru tað júst lond sum Føroyar – við tøttum tilknýti til náttúruna, ið hava størstan tørvin á, at náttúran er óspilt.

Sambandsflokkurin heldur, at tað hevur alstóran týdning fyri okkara samfelag, at boðskapurin um at vit taka Kyoto-avtaluna í álvara, verður sendur umheiminum.

– Kyoto-avtalan hevur sum mál at virka ímóti teirri heimsumfevnandi upphitingini, og málið er at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum við 5,2% samanborið við útlátið í 1990. Hetta skal gerast innan tíðarskeiðið 2008-2012.

Í tíðindaskrivi Sambandsfloksins um Kyotoavtaluna verður at enda sagt, at “meira fæst at vita við at venda sær til Kaj Leo Johannesen, floksformann”.

Nú Tjóðveldisflokkurin hevur borið uppskot niðan í løgtingið, har mælt verður til at seta Kyoto-avtaluna í gildi fyri Føroyar, fer Sosialurin at spyrja Kaj Leo Johannesen, um Sambandsflokkurin stendur við síni orð, sum flokkurin sendi fjølmiðlunum í tíðindaskrivi seinasta dag í oktober 2006.

Lesið eisini samrøðuna við Kaj Leo.

# – Eg skilji Boga – men vit eru ikki klovnar

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Jú, eg skilji væl, at Bogi Hansen ruskar undir okkara fólkavaldu, men eg eri ikki samdur við honum um, at vit politikarar eru nakrar klovnar.

Tað sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins.

Í Sosialinum fríggjadagin ruskaði Bogi Hansen, professari í havfrøði, av álvara undir okkara fólkavaldu.

Hann segði, at um Føroya løgting ikki samtykkir at seta í gildi Kyoto-sáttmálan at galda fyri Føroyar, er enn einaferð staðfest, at Føroyar verða stýrdar av nøkrum ábyrgdarleysum klovnum.

– Hetta er hart sagt, men eg kann væl fylgja Boga Hansen, sum ótolnast um, at heimurin – og eisini vit føroyingar – taka verulig tøk til tess at verja umhvørvið, nú líkt er til, at globala dálkingin rættiliga er farin av ávirka veðurlagið kring um heimin.

Spurdur, um úttalilsini hjá Boga Hansen, sum fekk norðurlendsku umhvørvisvirðislønina í fjør heyst, kunnu føra til eina sjálvrannsakan millum politikarar, heldur Kaj Leo Johannesen:

– Jú, tað er nakað um tað, og eg ivist onga løtu í, at sterku úttalilsini hjá Boga eru meint konstruktivt. Tað er eingin ivi í mínari sál um, at vit eiga at taka umhvørvi í størsta álvara – og í nógv størri álvara enn higartil.

Kaj Leo Johannesen sigur, at Føroyar sum land avgjørt eiga at senda eitt “signal” út í heim, sum sigur, at vit eru við í strembanini eftir størri umhvørvisvernd.

– Tað nyttar einki bara at siga, at vit vilja verða við. Vit mugu vísa umheiminumí verki, at vit ERU við. Gera vit ikki tað, verða Føroyar roknaðar sum b-land í hesum høpi, og tað er eitt vánaligt “signal” at senda út í heim, eisini til okkara marknaðarlond, sigur formaður Sambandsfloksins.